# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# PROFESSARIN OG POSTMAÐURIN



Tað var væntandi, at ein formansuppgerð fór at koma í Sjálvstýrisflokkinum eftir ta stóru útskifting av persónum í fremstu røð í flokkinum. Formaðurin seinastu átta árini er ein gamal og trúgvur sjálvstýrismaður, og eingin ivast í hvar hann stendur politiskt, væl plantaður í stig fyri stig politikkinum sum liggur á miðjuni í øllum - alt eftir, hvørjum flokkurin annars samstarvar við.

Tað er einki nýtt í tí, at fólk úr øðrum flokkum enda í Sjálvstýrisflokkinum og royna at koma sær framat har. Kára á Rógvu kunnu vit ikki leggja undir tað, tí hann hevur ikki verið uppstillaður fyri annan flokk, men fleiri av teimum næstu á listanum hava sitið á tingið fyri fleiri aðrar flokkar

At Kári Højgaard í sínari tíð gjørdist formaður var av tilvild. Í 2002 fall tann annars sterki maðurin í Sjálvstýrisflokkinum, Sámal Petur í Grund - og Kári Højgaard vann hansara sess. Sum einasti tingmaður floksins var hann sjálvskrivaður formaður.

Men Kári Højgaard hevur klárað uppgávuna væl. Hann er ein fólksins maður, altíð blíður og fyrikomandi - og hann hevur valla nakran figginda í politisku skipanini.

Nýggi formaðurin er akademikari, doktari í lóg. Tað eru øðrvísi fortreytir, enn postmaðurin og útróðrarmaðurin hevur. Kári á Rógvi umboðar tað nýggja ættarliðið í flokkinum - tað akademiska, ella tað yuppi-kenda ættarliðið.

Tað nýtist nú ikki at vera nøkur ódygd. Hann er væl lisin og gløggur. Tó hevur hann sýnt onkrar veikleikar sum politikari - serliga tann arrogansa, sum hann ofta sýnir miðlunum. Um hann ætlar sær nakað í politikki, so má hann taka telefonina og svara, tá hann verður spurdur.

Hóast tað var ein kvettroynd, sum varð framd móti Kára P. Højgaard, so dugdi hann í gjár væl at avparrera hana. Segði, at hann fyri langari tíð síðani hevði gjørt av at leggja frá sær. Tað man vera ein sannleiki við modifikatiónum, men tað var gløgt av honum at jarða formansstríðið við brestin. Flokkurin hevur ringar royndir av slíkum uppgerðum, tí tvær tær seinastu ferðirnar eru formenninir rýmdir úr flokkinum og valdir á ting fyri aðrar flokkar.

**Gløgt at jarða formansstríðið beinanvegin**

Tað fer Kári Post valla at gera. Hansara lutur verður helst at halda fast við gamla »stig fyri stig« politikkin, meðan akademikararnir - kanska uttan tað sóra úrslitið - fara at royna at flyta flokkin hendavegin ella handavegin. Men tað skal meira enn eitt manndómsbragd til at styrkja Gamla Sjálvstýri, tí tað eru 70 ár síðani, at flokkurin hevði fleiri enn trý fólk á tingi. Vit ynskja tó Kára á Rógvi góða eydnu við projektinum.

# Hóttu Kára Post

Tað er einki at ivast í, at Kári P. Højgaard hevur verður trýstur úr formanssessinum í Sjálvstýrisflokkinum. So seint sum 19. august í ár skrivaðu Heðin D. Poulsen og Kári Petersen eitt lesarabræv, har teir funnust hvassliga at flokkinum fyri ikki at liva upp til eina burðardygga fiskivinnu - hetta var í sambandi við ásetingina av fiskidøgum.

Heðin D. Poulsen og Kári Petersen eru nýggir í Sjálvstýrisflokkinum. Báðir hava uttan úrslit roynt at komið á ting fyri ávikavist Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin - teir hava umboðað hesar flokkar sum eykatingmenn. Teir vóru misnøgdir við sínar flokkar og fóru upp í Sjálvstýrisflokkin.

Tá Kári Petersen fór úr Javnaðarflokkinum, boðaði hann frá, at tað júst var fiskivinnupolitikk Javnaðarfloksins, hann ikki kundi stuðla.

Í nevnda lesarabrævi, sum teir sendu 19. august spyrja teir, um Sjálvstýrisflokkurin er burðardyggur og vísa á týdningin av, at høvuðsvinnan skal vera í tipp-topp standi.

*»Búskaparliga skal veiðan helst minkast enn meira, tí fyri at vinnan aftur skal fáast at geva yvirskot, so er neyðugt, at munandi færri skip eru í vinnuni enn í dag. Vit mugu tíverri staðfesta, at umboðið hjá tí flokki, sum vit hava rikið atkvøður til, ikki hevur lagt fram nakað alternativ til daganiðurskurð til tess at náa hesum málum um lívfrøðiliga burðardygga og búskaparliga gevandi fiskivinnu.«*, skrivaðu teir. Og síðani kemur almenna hóttanin:

*»Stór ónøgd er í flokkinum, men vit mæla limum floksins til at møta fjølmentir á teimum báðum høvum, sum nú fara at standa í boði, á aðalfundi í Streymoyarfelagnum 9. september og so tíðliga í oktober á landsfundi. Har fara vit at leggja fram uppskot um, at flokkurin í framtíðini skal arbeiða fyri øllum tiltøkum, sum føra fram móti burðardyggari fiskivinnu eftir lívfrøðiligari og búskaparligari ráðgeving.«*

Kári Post legði kongin júst 9. september, so nýggju sjálvstýrismenninir fingu sín vilja - og fingu Dr. Kára í staðin fyri Kára Post...



*Teir báðir nýggju sjálvstýrismenninir, Heðin D. Poulsen og Kári Petersen hava alment hótt Kára P. Højgaard viðvíkjandi fiskivinnupolitikkinum*



**Summi skelda illa**

TIL ARBEIÐIS
VIKUSKIFTI Á SÍÐU 14



**Mannminkan ella mannarættur**

KRONIKK UNI ARGE
VIKUSKIFTI Á SÍÐU 16-17



# Sláturhúsið í Dímum løggildað

Heilsufrøðiliga starvsstovan mikudagin í Dímun og kannaði sláturhúsið, sum tey hava bygt har úti og umstøðurnar annars til slátur.

Starvsstovan hevur góðtikið umstøðurnar og harvið játtað løggildan av sláturhúsinum.

Sláturhúsið í Dímun er tað einasta í landinum, sum er løggildað til slátur.

Úr Dímun siga tey, at tað er ein stórur dagur at hava fingið hesa løggilding.

- Vit hava arbeitt miðvíst og nýtt hvørja frítíðu at fyrireika og byggja henda bygning. Útgrevsturin byrjaði 2. juni 2007, so tað er nógv tíð farin við hesum arbeiði og nógv góð fólk hava veitt hjálpandi hond, siga bóndahjúnini í Dímun, Jógvan Jón Petersen og Eva í Dímun.

Løggildingin merkir, at tey í Dímun hava framíhjárætt í samband við sølu út í handlarnar, nú tey lúka krøvini í komandi matvørulógini.

Tey hava kortini ikki ætlanir um at fletta fyri onnur, men møguliga at góðska vídari sínar egnu vørur.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo

Tórshavn Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
Norðoyggjar Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
Suðuroy tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
*Haldarar, sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*